TÓRSHAVNAR KOMMUNA
BØRN OG UNG

# 5. FLOKKUR VÆLKOMIN
# UNGDÓMSHÚSIÐ Í HOYVÍK – KLUBB 188

Nú fer KLUBB 188 aftur at bjóða næmingunum úr 5. flokkunum í Tórshavnar kommunu at koma í ungdómshúsið í Hoyvík – KLUBB 188.

Endamálið við innbjóðingini er, at ungdómurin sleppur at uppliva umstøðurnar og tað virksemi, sum verður bjóðað í KLUBB 188, áðrenn tey fáa møguleika at koma í ungdómshúsið eftir summarfrítíðina.

KLUBB 188 heldur til í somu hølum sum Frítíðarskúlin í Hoyvík. Um kvøldarnar verða hølini broytt, at tey eru meiri innbjóðandi til ung.
Adressan er: **Vegurin langi 23, 188 Hoyvík**

Í ungdómshúsinum skulu tey ungu kenna seg trygg, hoyrd, sædd og vird. Ymiskleiki og tolsemi eru lyklaorð í málunum og virðunum í KLUBB 188.

Ungdómurin kemur bert í KLUBB 188 av egnum áhuga.

## VIRKSEMI SUM NÁMSFRØÐILIGT AMBOÐ
Virksemi í KLUBB 188 eitt námsfrøðiligt tilboð, sum gevur teimum ungu møguleika at menna sínar sosialu, kensluligu, skapandi, mentanarligu og samfelagsligu førleikar.

Tilboðini stimbra omanfyri nevndu førleikar og birta somuleiðis upp undir felagsskapin millum tey ungu.

Ungdómshúsið leggur dent á tryggan felagsskap, úr virkseminum kunnu vit m.a. nevna: KLUBBquiz, ymisk spøl, tøkni, prát, hugni, tónleikur, kiosk og ikki minst tryggan sosialan felagsskap, sum hevur stóran týdning fyri ungdómin.

**Opið verður fyri 5. flokki hesi kvøld áðrenn summarfrítíðina:**
Týsdagarnar 26. mai, 2. juni og 9. juni frá kl. 18.30-20.00.
Hesi kvøld letur KLUBB 188 upp fyri 6. fl. og eldri frá kl. 19.00.
*Hædd verður tikin fyri tilmælum í samband við covid-19*

Tað er ókeypis at koma í KLUBB 188.

Sí meira um KLUBB 188 her

Um spurningar ella annað, so eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við
Bjarna Beder, stovnsleiðara á tlf. 214789 ella bjarnibe@torshavn.fo